# Ein hugnalig løta hjá stórum og smáum



*Tríggjar av fittu, smáu nissunum, sum gingu runt og bjóðaðu øllum fólkunum karamellur og annað gott.*

*Borgarstjórin tóktist væl nøgdur við løtuna, tá ið jólatræið bleiv tendrað, og hann lurtaði eisini eftir frálíka tónunum frá Havnar Hornorkestri.*

*Mynd: Terji Nielsen*



*Havnar Hornorkestur setti enn einaferð sín dám á hugnaligu løtuna, tá ið jólatræið bleiv tendrað.*

*Mynd: Terji Nielsen*

**Aftur í ár høvdu hundraðtals havnarborgarar leitað sær oman til Tinghúsvøllin, tá ið jólatræið bleiv tendrað**

JÓLAHUGNI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eitt afturvendandi tiltak, sum fyri nógvar havnarborgarar er eitt slag av einum startskoti upp á jólini, er tá ið jólatræið á Tinghúsvøllinum verður tendrað, og alt annað jólaprýði í býnum eisini verður tendrað. Sum siður er, verður hetta gjørt leygardagin fyri fyrsta sunnudag í advent, og tað var nú farna leygardag.

**Nissur settu dám á**

Hundraðtals fólk vóru til hugnaligu løtuna. Áðrenn jólatræið bleiv tendrað, hildu bæði Sverri Steinhólm, prestur og Heðin Mortensen, borgarstjóri, røðu, og Havnar Hornorkestur setti sín serliga dám á løtuna. Men bráddliga kom jólamaðurin.

Við hjálp frá stigabilinum hjá Tórshavnar Sløkkiliði bleiv jólamaðurin lyftur upp til toppin á stóra jólatrænum, og við einum sonevndnum kúlufýsi tendraði hann træið.

Tá ið tað var gjørt, komu fleiri smáar nissur úr einum av gomlu sløkkiliðsbilunum, og við sær høvdu tær hvør sín stóran posa fullan av øllum møguligum góðum. Trúfastar gingu hesar smáu, fittu nissurnar runt og bjóðaðu bæði smáum og stórum okkurt gott, og ongin bleiv snýttur.




BYGNINGSVERK-
FRØÐINGUR &
BYGGIFRØÐINGUR

HMP Consult søkir eftir bygningsverkfrøðingi og byggifrøðingi at byrja beinanvegin.

Arbeiðsøkini, ið størvini umfata, eru bygningar og anleggsarbeiði.

Løn og starvstreytir sambært avtalu.

Áhugað kunnu ringja ella senda teldupost til HMP Consult, Hans Haraldsen, hans@hmp.fo, fyri at fáa meira at vita um starvið.

Umsókn saman við prógvum og viðmælum skal sendast til adressuna niðanfyri, merkt "Bygningsverkfrøðingur" ella "Byggifrøðingur", og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 9.

SISIERO 31800

HMP CONSULT Sp/f
Óluvugøta 12
FO-100 Tórshavn
Telefon 312279
Telefax 318346
Teldupostur hmp@hmp.fo

hmp CONSULT
VERKFRØÐIRÁÐGEVING



VERKSTAÐIÐ VÓN

**Jólasølan hjá Verkstaðnum Vón**

Árliga jólasølan verður á verkstaðnum
*mikudagin 30. november frá kl. 14.00 til 19.00*
*og hósdagin 1. desember frá kl. 14.00 til 19.00*

Møguleiki verður at keypa sær drekkamunn við onkrum heimabakaðum afturvið.

**Øll eru vælkomin**

**Verkstaðið Vón**
Hóvabrekka 1 - Argir